UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Dagfesting: **23. mars 2022**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 21/08502-86**

Svar

upp á

skrivligan § 52a fyrispurning nr. 52-144/2021 frá Johan Dahl, løgtingsmanni, um politisku avgerðina um uppsetan av eftirlitsradara, settur Jenis av Rana, landsstýrismanni í uttanríkis- og mentamálum.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Nær fer landsstýrismaðurin at taka endaligu politisku avgerðina um at loyva donskum myndugleikum at seta upp ein eftirlitsradara í Føroyum?

Svar

Til 1: Avgerðin um at seta upp lofteftirlitsradara í Føroyum verður væntandi tikin fyri summarfrítíðina.

Tá ið fyrispurningurin kom frá donsku stjórnini um at seta upp lofteftirlitsradara í Føroyum, byrjaði ein tilgongd, sum millum annað hevur fevnt um fleiri ráðførslur í Løgtingsins uttanlandsnevnd, viðgerð í landsstýrinum, fundir millum landsstýrismannin í uttanríkis- og mentamálum og danska verjumálaráðharran og skipað samskifti á embætismannastigi millum føroyskar og danskar myndugleikar.

Tað hevur frá byrjan verið umráðandi, at málið verður viðgjørt væl og virðiliga, og nóg mikið av tíð er sett av til hesa tilgongd.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður